Lívdin
- í lívd hins hægsta

Desember 2009



# Lívdin møguliga í Skúlan við Løgmannabreyt



Leiðslan í Lívdini er í hesum døgum í samráðingum við Tórshavnar Býráð um at leiga nýggja skúlan við Løgmannabreyt til virksemið hjá samkomuni.

Fundur hevur eisini verið við skúlastjóran og leiðaran á frítíðarskúlanum, har vit greiddu var frá virkseminum hjá Lívdini, og hvussu vit kundu hugsað okkum at brúkt tey ymisku hølini.

Vit hava verið sera væl móttikin og hava nú sent skrivliga umsókn til býráðið um leiguna av skúlanum. Vit hava biðið um miðhøllina, fimleikahøllina, niðastu lonina og evningarstovuna við høvuðsinngongdina umframt goymslurúm til stólar, tónleikaútgerð og annað.

Um alt gongur sum ætlað, kunnu vit flyta í skúlan tann 1. februar 2010.

*JZ*



## Friðarhøvdingi

Esaias profeterar: "Tí Barn er føtt okkum, Sonur er givin okkum, og á øksl Hansara skal harraveldið hvíla; Hann eitur Undurfullur, Ráðgevari, Veldigur Gud, Ævigur Faðir, Friðarhøvdingi." Es. 9:6. Á Betlehems mørkum varð kunngjørd stór gleði, og dýrd Harrans lýsti. Frelsarin var føddur og friðarhøvdingin komin. Hann kom við friði, men ikki bert tað, hann kom við FRIÐINUM - tað er í bundnum formi. Tað er friður Guds, sum "stígur upp um alt vit".

Tí er tað, at samkoman í Tessalonika, hóast umstøður, sum eru ógvuliga truplar við m.a. forfylging, kortini kann hvíla, tí hon hevur ognað sær "friðarhøvdingan", hann sum er sjálvur friðurin. Tú hevur kanska mótgongd, stríðist við sjúku, arbeiðsloysi, ella hevur aðrar trupulleikar, ið tyngja teg. So upplivir tú kortini, at friðurin ikki er tengdur at umstøðunum, tú ert í. Við endan av einum brævi, fylt við "lívsins stormum", sigur Paulus í 2. Tess. 3:16: "Og Hann sjálvur, Harri friðarins, gevi tykkum friðin, altíð, á allan hátt! Harrin veri við tykkum øllum!"



*Ólavur Jøkladal*

# Vinir í Lívdini

### Dópur í Hebron



Í sambandi við at seks ung úr Lívdini vórðu doypt týskvøldið 27. oktober í Hebron á Argjum, tók Pauli Djurholm hesa myndina. Tey, sum vóru doypt: Jónas Højgaard, Rasmus Hammer, Hanus Krett Hansen, Gunnvá Djurholm, Silja Wang og Jákup P. Olsen. Á myndini eru eisini Pauli Olsen, Magni á Lakjuni og Rúni Højgaard.

### Til lukku við barninum

28. mai bleiv Teitur stóribeiggi. Tá fingu Hildigerð og Eyðun Nygaard ein son, sum eitur Kristin. Hann var 55 cm langur og vigaði 3600 gr.



### Jólatiltak í Hoyvíkar Kirkju



Sunnudagin 29. november var eitt jólatiltak í Hoyvíkar Kirkju, har børn og ung úr Hoyvíkar Kirkju, Oasuni og Lívdini luttóku. Nógv ymiskt var á skránni sum t.d. sangleikur, kórsangur og dansi- og fimleikabólkar. Aftaná var ein hugnaløta í kirkjukjallaranum.

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing og bøn týskvøld kl. 20.**

1. des. Húsbólkar
8. des. Bønarløta
15. des. Bønarløta
22. des. Húsbólkarnir velja sjálvir, nær teir enda til jóla.
29. des. Einki møti

## Seinasti visiónsfundurin

Mánakvøldið 7. desember verður seinasti visiónsfundurin á Brekku. Ein røð av visiónsfundum hevur verið í Lívdini seinastu tíðina. Fundirnir hava verið hildnir í hølunum hjá Lívdini á Brekku. Við tað at samkoman er stór, hava fundirnir verið skipaðir soleiðis, at tær ymsu tænasturnar hava luttikið eftir tørni.

Eftir at komið er gjøgnum allar tænasturnar, ásannar leiðslan, at tað enn eru fleiri, sum hava gjørt Lívdina til sítt andaliga heim, ið av einihvørji orsøk ikki hava luttikið á nøkrum visiónsfundi.

Leiðslan ynskir, at so nógv sum møguligt siga sína hugsan, og hevur tí avgjørt at halda ein uppsamlandi visiónsfund mánakvøldið 7. desember kl. 19.15 í hølunum á Brekku. Hesin fundur er ætlaður teimum, ið hava gjørt Lívdina til sítt andaliga heim, og sum enn ikki hava luttikið á nøkrum visiónsfundi. Fyrireikararnir vóna at síggja nógv fólk til fundin.

## Hevur tú hug at læra grikskt?

Í vetur verður møguleiki at læra nýtestamentligt (koine) grikskt á skeiði, sum Lívdin skipar fyri frá 4. januar til 31. mai 2010. Undirvísingin fer fram tveir tímar mánakvøld, tilsamans 21 kvøld. Enn er ikki avgjørt, hvar skeiðið verður hildið. Tað verður annaðhvørt í Eysturoynni ella í Havn. Kostnaður: 650 kr. Áhugað kunnu seta seg í samband við: Hallur Mortensen Tlf. 316883 T-post: skarvur@gmail.com ella Jógvan Zachariassen Tlf. 522212 T-post: jogvanz@olivant.fo. Tilmeldingarfreistin er 1. januar 2010.



*Hallur Mortensen*

## Tá lívið gerst trupult



Agape.fo bjóðar nú skeið fram um handfaring av strongd.

Strongd er ikki ein sjúka ella tekin um veikleika. Strongd er ein fylgja av overving av onkrum slagi. Um vit ikki hava førleikar til at handfara hesa overving, so er vandi fyri, at strongdin kann føra til t.d. tunglyndi.

Skeiðið er sett saman av fýra samanhangandi pørtum, sum eru einaferð um mánaðin frá hálvum januar til hálvan apríl 2010. Endamálið við skeiðinum er at gera luttakaran betri føran fyri at handfara strongd í gerandisdegnum.

Undirvísari verður Ole Rabjerg, autoriseraður psykologur. Ole er í starvi hjá felagnum Agape í Danmark, har hann hevur terapi, fyrilestrar og skeið sum byggja á tað kristna lívs- og menniskjasjónarmiðið.

Les meira á www.agape.fo

## Nýggjárstiltak á Hálsi

Á nýggjárinum verður eitt tvørkirkjuligt tiltak í høllini á Hálsi. Tiltakið eitur "NÝTT 2010" og er skipað á sama hátt sum í Badmintonhøllini í fjør undir heitinum "NÝTT 09". Dyrnar lata upp kl. 00.30, beint eftir at nýggjárið er skotið inn, og tiltakið varir til kl.03.30.

Á skránni verður café, sangframførslur, lovsangur, undirhald og andakt. Ókeypis drekkamunnur við kaffi, te, saft, køku og suppu verður eisini at fáa. Fyrireikararnir vóna, at tiltakið, eins og í fjør, fær góða undirtøku.




# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

## Sunnudagin 6. desember

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Í heita stólinum: Prát við Rúna Højgaard |
| | Evni: Hvat droymir tú um? |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | Evni: Hann, sum kom og kemur aftur |
| | Talari: Zacharias Zachariassen |
| | * Innsavning til nýggja bygningin |


Rúni

## Sunnudagin 13. desember

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Heiti stólurin |
| | Evni: Jólini fyri teg |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | Evni: Friður á jørð |
| | Talari: Jógvan Zachariassen |


Zacharias

## Sunnudagin 20. desember

Jólamøti kl. 10.30

## Sunnudagin 27. desember

Nýggjársmøti kl. 10.30


Jógvan

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*